Fylgiskjal 2.

**Nella Festirstein**

**Fra:** Sólja í Ólavsstovu
**Sendt:** 30. oktober 2018 13:39
**Til:** Nella Festirstein
**Cc:** Jette H. Eirikstoft
**Emne:** SV: Til ummælis. Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing (Tilhaldslógin) (Bráðfengis frástøðuboð sett inn og orðið "tilhald" broytt til "frástøðuboð"). Ummælisfreistin er 26. november.

Góða Nella,

Takk fyri fyri uppskot til ummælis.

Umboðsmaðurin ummælir sum meginregla ikki lógaruppskot, sum ikki beinleiðis viðvíkja umboðsmansstovninum.

Í listanum yvir hvønn uppskotið er sent til stendur "Barnaumboð". Almenna heitið á stovninum er "Løgtingsins umboðsmaður", og rættast er at brúka hetta heitið, tá stovnurin verður umrøddur.

Vinaliga

Sólja í Ólavsstovu
**Løgtingsins Umboðsmaður**
undir Bryggjubakka 11
Postboks 2008
110 Tórshavn

Tlf. +298 358500
Fax. +298 358501
lum@lum.fo
www.lum.fo

Fyrivarni:
Innihaldið í hesum telduposti er ætlað omanfyri nevnda móttakara og kann innihalda upplýsingar veittar í trúnaði. Um tygum ikki eru rætti móttakarin, skulu vit gera vart við, at tað ikki er loyvt at avdúka, margfalda, spjaða ella á annan hátt at nýta innihaldið. Um tygum orsakað av mistaki hava móttikið henda teldupost, verða tygum vinarliga biðin um at seta tygum í sambandi við okkum og strika tilfarið í tygara telduskipan.

Confidentiality notice:
The information contained in this e-mail is intended for the named recipient only as the contents may be confidential. If you are not the intended recipient, please note that you are not permitted to reveal, copy, distribute or otherwise use the contents. If you have received this e-mail by mistake, please contact us and delete the material from your computer system

**Fra:** Nella Festirstein
**Sendt:** 29. oktober 2018 09:07
**Til:** hem@sorinskrivarin.fo; JKO017@politi.dk; Elkin.Klettheyggj@kriminalforsorgen.dk; Mentamálaráðið ; Almannamálaráðið ; Heilsu- og innlendismálaráðið ; bardurl@setur.fo; kf@kf.fo; LUM Postur til Stovnin ; AV Almannaverkið ; petersen@adv.fo; mail@psykolog.fo; Elin Winther Poulsen ; kris@kris.fo; barnabati@barnabati.fo;

post@kvinnuhusid.fo; bvs@bvs.fo; javni@javni.fo; lararaf@lararafelag.fo; pedagog@pedagogfelag.fo; aaa001@politi.dk; megd@megd.fo; amnesty@amnesty.fo; GIGNI Postur til Stovnin ; srfelag@gmail.com
**Emne:** Til ummælis. Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing (Tilhaldslógin) (Bráðfengis frástøðuboð sett inn og orðið "tilhald" broytt til "frástøðuboð"). Ummælisfreistin er 26. november.

Hjáheft verður sent tykkum til ummælis *Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing (Tilhaldslógin) (Bráðfengis frástøðuboð sett inn og orðið "tilhald" broytt til "frástøðuboð")*

**Freistin at senda ummæli er mánadagin 26. november.**

Ummæli skal sendast til nellaf@tinganes.fo

## Broytingarnar í stuttum

Løgtingslóg um tilhald, uppihaldsforboð og burturvísing (Tilhaldslógin) varð samtykt av Løgtinginum í tingsetuni 2016 og kom í gildi 1. apríl 2017.

Í hesum uppskotinum verður gjørdar tvær broytingar:

*1. Nýtt orð: Frástøðuboð*
Undir viðgerðini í tinginum av Tilhaldslógini vóru fleiri tingfólk, sum hildu, at orðið "tilhald" ikki var eitt nóg sigandi og føroyskt. Sambært § 1 í løgtingslógini er tilhald eitt revsiálagt forboð um at leita upp ein annan persón antin persónliga, munnliga ella skrivliga, her uppi í eisini við elektroniskum samskifti, ella á annan hátt at seta seg í samband við ella elta ein annan.

Lógartænastan fekk í mars 2017 nøkur uppskot um annað orð fyri "tilhald" frá Marjun Arge Simonsen, málfrøðingi. Uppskotini vóru send Málráðnum, sum var biðið um at siga sína hugsan. Í september 2017 svaraði Málráðið, at starvsnevndin hevði viðgjørt fyrispurningin um annað orð fyri tilhald í løgfrøðimáli, og har var semja um at viðmæla frástøðuboð, sum er eitt av uppskotunum hjá Marjuni Arge Simonsen, tí hildið varð, at tað innihaldsliga hóskar væl við skilmarkingina av hugtakinum.

Skotið verður upp at broyta "tilhald" til "frástøðuboð".

*2. Bráðfengis frástøðuboð*
Broytingin heimilar Fútanum at taka fyribilsavgerð um frástøðuboð (bráðfengis frástøðuboð), sum fyri fyrst skal verja órættaða og møgulig húsfólk hjá órættaða, inntil Fútin kann taka eina endaliga avgerð um frástøðuboð ella uppihaldsforboð. Bráðfengis frástøðuboð hevur sama rættarvirknað sum vanligt frástøðuboð eftir Tilhaldslógini.

Munurin er serliga, at vanligu illgrunakrøvini, t.e. grundaður illgruni, fyri at kunna áleggja tilhald eru linkað; hetta er fyri at tryggja skjóta vernd av órættaða. Broytingin inniber, at fyribils tilhald kann verða álagt, um ein persónur við rímiligari grund er undir illgruna at valda einum øðrum ónáðir, at tað eru ávísar orsøkir eru at halda, at viðkomandi framhaldandi fer at volda hinum ónáðir, og at viðkomandi ikki hevur ein rímiligan áhuga í at seta seg í samband við hin persónin.

**Uppskotið er sent beinleiðis til:**

- Føroya rætt
- Føroya landfúta
- Kriminalforsorgina
- Mentamálaráðið
- Almannamálaráðið
- Heilsu- og innlendismálaráðið
- Føroya Kommunufelag

- Barnaverndarstovu Føroya
- Barnaumboðið
- Føroya Fróskaparsetur
- Almannaverkið
- Gigni
- MEGD
- Javna
- Føroya advokatfelag
- Føroyskir sálarfrøðingar
- Sosialráðgevarafelagið
- Føroya lærarafelag
- Føroya pædagogfelag
- Føroya politistafelag
- Sig Frá
- Amnesty International
- Kris
- Barnabata
- Kvinnuhúsið

Uppskotið er eisini lagt alment út á ummælisportalin hjá Føroya landsstýri, so øll hava møguleika at senda inn ummæli.

Vinarliga

Nella Festirstein
Deildarstjóri

Løgmansskrivstovan
Lógartænastan
Beinleiðis tlf: +298 55 80 76

Fyrivarni

Telduposturin, sum verður sendur Løgtingsins umboðsmanni, kann ikki sendast brongladur (krypteraður). Tí verður ráð frá at senda trúnaðarupplýsingar við vanligum posti.
Innihaldið í hesum teldupostin er ætlað omanfyri nevnda móttakara og kann innihalda upplýsingar veittar í trúnaði. Um tygum ikki eru rætti móttakarin, skulu tygum gera vart við, at tað ikki er loyvt at avdúka, margfalda, spjaða ella á annan hátt at nýta innihaldið. Um tygum orsakað av mistaki hava móttikið henda teldupost, verða tygum vinarliga biðin um at seta tygum í samband við okkum og strika tilfarið í tygara telduskipan.

Confidentiality notice

Emails to Løgtingsins umboðsmaður cannot be sent encrypted. Therefore you are advised to send confidential information by regular mail.
The information contained in this e-mail is intended for the named recipient only as the contents may be confidential. If you are not the intended recipient please note that you are not permitted to reveal, copy, distribute or otherwise use the contents. If you have received this e-mail by mistake, please contact us and delete the material from your computer system.